**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

# Tá málið verður ein ideologi



TÍÐARGREININ
*Sjúrður Skaale*

**Qlaxvík? Zumba? Er henda stævsedingin ykky sgeiv? Jú, hon er høpisleys. Og argumentini fyri skerda stavraðnum eru eisini høpisleys. Latið okkum gera tað, sum er skilabest. Tað ger einki um tey, sum hava rætt, eisini fáa rætt**

"... tað er nakað helvitis tvætl".
"Sjúrður Skaale hevur einki annað gjørt í tveir mánaðir enn at profilerað seg við at søkja at tí føroyska málinum".
Orðini segði Tobbi í eini samrøðu við Rás2 um hetta góða alfabet-málið.
Tá uppskotið varð viðgjørt á tingi segði sami maður, at hevði ein sambandsmaður lagt tað fram, hevði hann "verið ákærdur fyri landasvik og alt tað fúlasta mann kann siga um eitt menniskja". Og hann helt fram: "hevði tað verið í einum U-landi, so hevði hann allarhelst verið skotin".
Eitt sindur hvøss orð má sigast - sjálvt tá tey verða verða tikin út Tobbasa stundum óstortliga vocabularium.
Tað merkiliga er, at tað ikki var nakað málsligt stórmál, sum fekk sinnið í Tobban. Einans eitt uppskot um, at nakrir bókstavir skulu setast inn í okkara alfabet. Ikki fremmandir bókstavir, men stavir sum vit øll, eisini Tobbi, brúka hvønn einasta dag tá vit skriva føroyskt. Og stavir, sum fleiri túsund føroyingar bera í sínum navni.
Tað snýr seg altso um at fremja eina neyðuga justering, so samsvar verður millum alfabetið og veruleikan. So føroyska alfabetið kann hýsa veruleikanum. So vit ikki longur hava eitt føroyskt alfabet til pynt, og eitt útlendskt, sum vit brúka.
Men tað var ikki bara Tobbin, sum sló hart á knappaborðið.
Tað, sum onnur hava sagt - bæði alment og (serliga) í privatum teldubrøvum - hevur verið lítið mildari.
Men tað er ókey. Grundleggjandi er tað jú positivt, at kjak um málið vekir so sterkar kenslur. Tað vísir, at Føroya mál, enn sum áður, kann "røra hjartastreingir". Fólk eru ikki líkasæl - og so leingi tey ikki eru tað, skal føroyskt nokk yvirliva.

**Kritikkur tikin til eftirtektar**
Men hvat var tað, sum gjørdi nøkur fólk so ill?
Í fyrstani var ónøgd við ætlanina um at skipa alfabetið við løgtingslóg. Løgtingið skal ikki avgera ein málfrøðiligan spurning við lóg, varð sagt. Tí hvat verður so tað næsta?
Hesin kritikkur var skilagóður - og hann var eisini tikin til eftirtektar: Løgtingið avgjørdi ikki spurningin við lóg (- hóast meiriluti helst hevði verið fyri tí). Í staðin varð samtykt, at eitt málráð skal fáa heimild at gera hetta av. Tey kritisku fingu altso sín vilja.
Løgtingslimir søgdu kortini sína hugsan um spurningin, eins og ein samd mentanarnevnd mælti til, at vit fáa eitt fult alfabet. Men við hesum tilmæli slepti Løgtingið málinum.

**Qlaxvík?**
Kritikkurin helt kortini fram:
At víðka alfabetið fer at skapa ruðulleika! segði ein. Tað fer at "smildra føroyska rættskriving", segði ein annar.
Fólk fara at sleppa øllum reglum. Tey fara ikki longur at skriva sirkus, men circus, segði ein. Einki barn fer at skriva Selatræ! segði ein annar. Tey fara at skifta millum Celatræ og Zelatræ! Sára fer antin at skrivast Zára ella Cára. (Eg fari helst at eita Cjúrður...)
Hugsanin tykist altso vera, at fólk gera sær sína egnu stavseting burtur úr alfabetinum. Og jú fleiri stavir, jú størri ruðulleiki.
Hetta er, orsaka vendingina, nakað forferdiligt tvætl. Eingin fer nakrantíð at skriva hvørki Celatræ, Wiðareiði, Zumba ella Qlaxvík!
Alfabetið er bara eitt yvirlit yvir teir stavir, vit nýta. Stavsetingin sigur, hvussu teir skulu nýtast. Hon sigur, hvat er rætt og hvat er skeivt. Henda stævsedingin er sgeiv. Og hendan er røtt.
Vit hava bæði fyrra I og seinna Y í alfabetinum. Men fyri tað er eingin, sum skrivar "ykky" tá hann skal skriva "ikki". Tí "ykky" er skeivt og "ikki" er rætt.

**Skeiv samkoma**
Tað hevur eisini verið tosað um at ynskja danskt prestastýri. Um at vilja steðga allari orðagerð. Um at vanvirða 100 ára málstrev. Og mangt annað, sum ikki er vert at svara til.
Men tann mesti - og mest áhugaverdi - kritikkurin, hevur snúð seg um persónar:
"Tú gevur Málfelagnum rætt!"
"Tú ert farin í part við André og teimum!"
"Tillukku við tínum nýggju vinum!"
Problemið var, at eg gav tí skeiva partinum rætt...
Hetta vísir, hvussu partarnir í málkjakinum farnu árini er dotnir niður í tvær skotgravir. Øðrumegin hevur staðið tað konservativa Fróðskaparsetrið og hinumegin tað liberala Málfelagið. Tað hava verið Jóhan Hendrik og hansara menn móti André og hansara monnum.
Og tað hevur ikki borið til at verið kritiskur móti báðum. Ella at tikið undir við báðum. Tann, sum ikki hevur verið við, hevur verið ímóti.
Tað, sum teir konservativu hava sagt um Málfelagið, hevur mint um tað, sum víðgongdir babtistar kundu sagt um kirkjuna: Prestar ber ikki til at tosa við! Teir hava ikki bara skeivt - teir eru sjálvur skeivleikin!
Tað, sum málfelagsmenn hava sagt um teir konservativu, hevur verið í sama duri. Báðir partar hava hildið, at hin parturin hevur viljað málinum ann. Júst sum tann víðgongdi kristni heldur tey, sum hoyra til skeiva samkomu, vilja sjálvum kristindóminum ann.

**Góður dynamikkur**
Eg fegnist stórliga um, at nýggja Málnevndin er meira pragmatisk enn tann gamla. Tí eingin vil málinum ilt. Øll tey, sum nýta tíð og orku til kjakið, økja málsligu tilvitanina. Tey gagna málinum. Tey vilja málinum tað besta. Men tey eru ósamd um, hvat tað besta er.
Eg haldi vit øll mugu ásanna, at tann puristiska kósin á mangan hátt hevur verið gagnlig. Somuleiðis er greitt, at "málreinsingin" stundum er farin ov langt. Mál er ein livandi organisma, sum má sleppa at mennast frítt millum fólk. Málið hjá fólkið kann ikki og skal ikki stýrast meira enn eitt vist.
Ósemjan millum setur og Málfelag hevur skapt ein fínan dynamikk í kjakinum. Men tá tað verður sekteriskt og ideologiskt, er tað ikki gagnligt longur. Tá tað avgerandi ikki er hvat verður sagt, men hvør sigur tað, eru vit farin av kós.
Orðaskiftið um alfabetið vísir, at tað er hetta, sum er hent.
Tí argumentini fyri skerda alfabetinum eru ikki logisk. Tey snúgva seg ikki um sjálvan spurningin, men um flokkadrátt. Persónsstríð. Ideologi. Alt tað, sum sum so mangan forðar skilagóðum loysnum. Tey byggja á eina hugsan um, at hóast mótparturin hevur rætt, so skal hann ikki fáa rætt.
Eitt dømi um hetta var maðurin, sum illsliga segði við meg: Her skal einki broytast! Tað føroyska ABC'ið er ivaleysa gott...!

» Ósemjan millum setur og Málfelag hevur skapt ein fínan dynamikk í kjakinum. Men tá tað verður sekteriskt og ideologiskt, er tað ikki gagnligt longur «

» Hevði tað verið í einum U-landi hevði tann, sum setti uppskotið fram, helst verið skotin «

» Bæði liberal og konservativ vilja málinum tað besta. Men tey eru ósamd um, hvat tað besta er «

» Eingin fer nakrantíð at skriva hvørki Celatræ, Wiðareiði, Zumba ella Qlaxvík «

Tíðargreinin

# Hvør løga brølar harðast?



KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður
Sjálvstýrisfloksins

Hvat er betri, rakstur ið skapar vøkstur – ella íløga ið skapar viðlíkahald? Hvat loysir seg betur, at geva fólki hægri útbúgving ella breiðari veg? Tíðin er komin at brøla fyri skúlaskapi.
Øll søgdu seg undan valinum farna at vilja raðfesta útbúgving og bjóða bleytar virðispakkar. Sjálvstýrisfólk høvdu hug at biða hini ikki troka soleiðis inn á okkara higartil so einsamøllu hugsjónir, men fegnaðust kortini, tí nú mundi okkurt fara at henda. Sjálvstýrisflokkurin fór tí á val uppá betri skúlaskipan, hægri útbúgving í Føroyum, at fáa ungdómin heim, at síggja lesandi sum arbeiðsmegi, og at leggja dent á, at útbúgving er vinna. Í hesum liggur bæði okkara lívsfatan – skúli og mentan eru vegurin til størri eydnu og samfelag í landinum – og okkara íløguraðfesting – skúli og mentan eru vegurin til størri framleiðslu og búskaparligt fjølbroytni.
Men hóast lyftini um altjóða universitet og tíggjutals milliónir eyka til skúlanna, sóu vit, hvussu flestu tingfólk hugsa: 23 atkvøddu fyri at bora tunnil til Sandoyar uttan fyrst at tryggja búskaparliga grundarlagið; 31 tingfólk atkvøddu fyri fíggjarlóg við tveimum tunnlum Norð um Fjall uttan fyrst at hugsa um framtíðar búskapin hjá Norðoyggjum, sum heldur krevur, at skúladepil verður bygdur og útbúgvingarumhvørvi verður skipað.
Sjálvstýrisflokkurin mátti traðka til at bjarga Skúladeplinum í Marknagili. Vit høvdu lovað at plaffa teir leysa revolvaramenninar í CHE niður – og vit gjørdu tað – okkara broytingaruppskot varð samtykt, sum tryggjar knappar 400 milliónir til hesa útbúgvingaríløgu, umframt at atlit verða tikin til orku, umhvørvi, byggilist og skúlatørv. Men í løtuni rógva vit andróður í hesum stríðnum, tí flestu tingfólk eru sosialiseraði inn í somu vanahugsan, sum frammanundan ráddi. Tey flestu kenna ramsuna í Animal Farm (Kammerat Napoleon), at 'fýra føtur eru góðir – tveir føtur ringir.' Nakað líknandi er á tingi, har flestøll jabba upp í saman 'íløgur eru góðar, rakstur er ringur.'

**Løgur mugu hava tenn**
Í almennum skjølum (óvíst hví) eita íløgur nú bara 'løgur.' Men verri enn stavimátin er definitiónin av løgu. Alt úr betongi, stáli ella asfalti ið fer yvir ávísan kostnað ella tíðarkarm er løga. Síðani verður fíggjarlógin býtt í tveir partar – løgur og rakstur. Mytan, ella rættari politiska lívslygnin, verður síðani skapt, at løgur eru góðar, tí tær bert kosta einaferð, meðan rakstur er ringur, tí hann bara vindur uppá seg, kann ikki minkast aftur. Økt upptøka á hægri skúlum er tí ring, økt tunnlalong er tí góð.
Veruleikin er oftast beint øvugtur. Kári P. Højgaard fekk til dømis staðfest, at Leynatunnilin kostaði kr. 17.300.000 at umvæla – ein ørandi upphædd, svarandi til meira enn árligu útreiðslurnar til at granska og undirvísa á gamla Fróðskaparsetrinum. Hetta kann bókast sum løga – men prógvar eisini, at antin løga ella rakstur altíð má koma í løgu stað. Tunnlar eru óendaliga dýrir, serliga teir, sum ikki skapa nakran búskaparvøkstur, men bert bøta um vælferðina hjá teimum ferðandi.
At velja túsundtals undirvísignartímar heldur enn einstakar tunnilsmetrar krevur afturímóti onki viðlíkahald ella fleiri 'uppfylgjandi' løgur. Tí tey, sum hava fingið fak, førleika, menning og eftirútbúgving, kasta pengar av sær, økja framleiðslu, skapa vælferð hjá okkum øðrum at fordeila.
Sum løgur brøla útbúgving og gransking so nógv harðari enn betong og asfalt!